# Í RYBERGS FÓTAFARI

## Um Vágsbotn, Bringsnagøtu og føroyska blaðsøgu

*eftir Hanus Kamban*

**Hugleiðingar tá nýggja miðlahúsið í Vágsbotni varð alment tikið í nýtslu**

Fyri hálvari aðru øld síðani tók eitt tíðarskeið við í hesum oyggjum, har samfelagið læt dyrnar upp fyri tí einstaka og gav honum - og henni - frælsi til at royna sínar gávur og sína orku á øllum økjum, m.a. eisini tí handilsliga og mentunarliga. Frammanundan vóru møguleikarnir hjá tí einstaka nógv skerdir, og tann skipan, sum tá valdaði - við einaveldi í Danmark og - hjá teimum fátæku - giftingarforboði í Føroyum - var í summum lutum lík henni, sum í dag eyðkennir nøkur muslimsk lond. Tá ið so ognirnar hjá Tí Kongaliga Einahandlinum vórðu seldar á uppboði í 1856, vórðu tær keyptar av trimum privatum handilsfyritøkum: Siemsen, Skibsted og M.C. Restorff. Tvey pakkhús vóru tá í Vágsbotni, Nýggja Pakkhús, sum Siemsen keypti, og Gamla Pakkhús, sum Restorff keypti.

Men longu eina lítla øld frammanundan høvdu vit føringar fingið tann fyrsta smakkin av liberalismuni. Baksýnið fyri hesum var tey hørðu kríggini millum Ongland og Frakland frá 1689 og til 1815, og har serliga sjeyárakríggið 1756-63, tað norðuramerikanska hjálandakríggið 1755-63 og tað amerikanska frælsiskríggið 1775-83. Hesir dýru bardagar tvingaðu bretar at leggja ofta sera høgan toll á innflutning til Onglands, m.a. tubbakk og rúsdrekka.

Sostatt var gróðrarbotnur skaptur fyri loynihandli í stórum stíli. Tá ið so høvuðsstøðin fyri hesum handli á oynni Man varð afturlatin í 1765, kom møguleikin til Føroya. Rybergs Handil, stovnaður av tí danska keypmanninum Niels Ryberg,



*Hanus Kamban, rithøvundi var við sinum vælvaldu orðum við til at geva nýggja miðlaumhvørvinum í Vágsbotni lív og sál*

*Mynd Jens K Vang*

fór at virka her í 1768 og helt fram til 1788. Her í Vágsbotni vórðu pakkhús bygd, og niðri við sjógvin varð bygd atløgubryggja. Higar komu skip úr Vesturindia, úr Trankebar í India, úr Miðalhavi og úr Danmark. Við sær førdu tey romm, ginn, genever, cognac, vín, tubbakk, te og sukur. Her varð so varan umskipað í eingilsk og skotsk skip og síðan førd til Onglands og borin í land ivaleyst á eyðmjúkum støðum, sum tað enska tollvaldið ikki visti av. Í Rybergs Handli høvdu o.u. 30 fólk fast arbeiði - bretar, skotar, føringar - sum m.a. bøkjarar, arbeiðsmenn og tubbaksspinnarar. Fremmand tungumál og ljóð av sekkjapípum hoyrdust tá í Havnar trongu gøtum, og handilin gav býnum ein dám av kosmopolitismu.

Hetta er, kunnu vit siga, tann søguligi karmurin um hetta nýggja tíðarskeiðið í søguni hjá Sosialinum, hjá blaðsins starvsfólkum og hjá Jan Müller blaðstjóra. Rybergs andi - við sínum fleyri av fyritakssemi, frælsi og heimsborgaraskapi - sveimar yvir hesum stað, og á torginum út ímóti sjónum stendur Nólsoyarpáll - sum blaðungur skal hava siglt við Rybergs skipum - og minnir okkum á at hava víðan sjónarring og við hugflogi og treysti leggja upp fyri bakkastum og mótgangi.

Nú skal eg ikki vera drúgvur, men eg havi kortini hug at taka fram eitt annað søguligt stað, sum kanska er uppaftur meira viðkomandi, nú eitt blað setir búgv her í Vágsbotni. Her verður hugsað um tey gomlu Býráðshúsini uppi í Bringsnagøtu, fyrr ogn hjá Napoleon í Dali og nevnd Arnes Minde. Staðið varð fyrr rópt Niðri á Bakka. Her búði í fyrru helvt av 18. øld Jørgen Nolsøe, ið var sjómaður og sonur Jákup Nolsøe forvaltara. Í húsunum her sá tann 13. mai 1852 fyrsta blað í Føroyum *Færingetidende* dagsins ljós. Blaðstjóri var tann ungi sakførarin Niels Winther, sum hevði tvey høvuðsmál: at fáa løgtingið endurreist og at fáa einahandilin avtiknan.

Stuttligt hevði verið, um vit í dag kundu komið á tal við Niels Winther, um eitt nú umboð fyri útvarp ella sjónvarp kundu hoyrt hann sjálvan greitt frá hesum upphavsins morni í føroyskari blaðsøgu. Tað kunnu vit ikki. Men tað vil so til, at vit kunnu koma á tal við ein annan mann,







*Nýtt og gamalt. Óli P leitar aftur til Rybergstíð*